## Próvtøka um ein mánað

Tey, sum ætla sær at verða leikaraumboðsmenn, sum arbeiða við at keypa og selja fótbóltsspælarar, fáa nú møguleikan at fara til próvtøkuna, ið tað er neyðugt at standa. Fótbóltssambandið boðar frá, at royndin til FIFA Player`s Agents verður í FSF húsinum hósdagin 25. september klokkan 10. Royndirnar verða hildnar samstundis í øllum FIFA londunum. FSF sigur, at tilmeldingin skal vera skrivlig við upplýsingum um navn, bústað, føðingardag og annað. Boðast skal frá í seinasta lagi 4. september. Fyri at tilmeldingin skal vera galdandi, skulu 500 krónur flytast á konto, sum er upplýst á heimasíðuni hjá FSF, har skjalið at nýta í sambandi við tilmeldingina eisini er at finna.



## Útsett í eina viku

Nú hevur FSF endiliga boðað frá flytingini av 19. leikumfari í Formuladeildini, sum tað hevur verið greitt, at tað var neyðugt at flyta, síðani tað varð greitt, at landsliðið skal spæla í Portugal mikukvøldið í næstu viku. Umfarið er flutt frá mikukvøldinum 20. august og til mikukvøldið 27. august. Skráin fyri 19. umfar sær soleiðis út: ÍF-B36, NSÍ-B71, EB/Streymur-KÍ, HB-Skála og Víkingur-B68. FSF hevur eisini boðað frá, at grannauppgerðin í 20. umfari millum B68 og NSÍ, sum upprunaliga var ásett at vera mánakvøldið 25. august, er flutt til sunnudagin 24. august. Harvið fáa teir í Runavík og teir á Toftum somu hvíld undan umfarinum, sum verður spælt mikukvøldið 27. august, sum øll hini liðini fara at fáa.

# Føroya feløgini vunnu seg víðari

**Fleiri føroyskir landsliðsspælarar vóru í gjárkvøldið partar av fyrsta umfari í donsku steypakappingini**

**DANMARK**
*Jákup Mørk*



Fyrsta umfarið í donsku steypakappingini í fótbólti var í gjár. Fýra feløg, sum føroyingar so ella so kenna seg hava samband við, luttóku í fyrsta umfari, og felags fyri tey øll var, at tað eydnaðist teimum at spæla seg víðari í næsta umfar, sum verður annað vikuskifti.

Seinnapartin í gjár var Frem á Bornholm, har mótstøðuliðið var Rønne FB, ið er triði besta fótbóltsfelagið á oynni. Eingin ivi var um, at Frem var betra liðið, men tað gekk eitt sindur striltið við málskjótingini.

Tað eydnaðist kortini at vinna 3-0. Jón Rói Jacobsen var alla tíðina í miðverjuni hjá Frem. Atli Danielsen varð skiftur inn á miðvøllin, tá ið tað restaði eitt korter. Tá var støðan 2-0.

Christian Høgni Jacobsen var alla tíðina í álopinum, tá ið AB á heimavølli vann 5-1 á Køge. Hóast AB skoraði fimm ferðir, og Christian Høgni var partur av álopinum, so eydnaðist tað ikki hesa ferð føroyska landsliðsspælaranum at teljast millum málskjúttarnar.

Eftir vónbrotið, sum tað var hjá FC Amager orsaka av mistaki við umsiting av kortum at missa øll trý stigini, eftir at hava vunnið 4-2 á Lyngby, mundi steypadysturin mikukvøldið kennast sum uppreisn. FC Amager vitjaði í Skovlunde, har tað eydnaðist at vinna 4-1.

Lukasz Cieslewicz, sum barna- og ungdómsárini spældi við VB, er nú í Hvidovre, sum aftur er í næstbestu deildini. Í gjárkvøldið vóru Lukasz og liðfelagarnir í Ølstykke, har Hvidovre vann 6-1. Lukasz Cieslewicz staðfesti stórsigurin við at skora til 6-1.

# Deymur av millíónum í Aalborg

**Nógv bendir á, at danska meistaraliðið verður einasta norðurlendska umboðið í europeisku meistarakappingini**

**EUROPA**
*Jákup Mørk*

Eftir fyrru dystirnar í 3. innleiðandi umfarið í europeisku meistarakappingini í fótbólti, bendir alt á, at danska meistaraliðið fer at verða einasta norðurlendska umboðið í bólkaspælinum.

Mikukvøldið hevði AaB vitjan av litaviska Kaunas. AaB vann 2-0. Leingi megnaði litaviska meistaraliðið at halda tætt. Gestirnir vístu ikki ábendingar um nakað annað, enn at teir vóru komnir til Danmarkar at binda fyri í verjupartinum.

Setningurin hjá Kaunas eydnaðist, inntil tað bara restaðu nítjan minuttir. AaB hevði fleiri upplagdar málmøguleikar, men tað gekk striltið at fáa mál. Tað eydnaðist í 71. minutti, tá ið Caca skoraði, og fýra minuttir undan leikloki staðfesti Jeppe Curth 2-0 sigurin.

Í Aalborg vóru tey væl nøgd við úrslitið, men tað hevði verið uppaftur betri, um tað hevði havt eydnast at skjóta eitt ella tvey mál afturat. Í danska fótbóltsheiminum verður mett, at



tað er eini 70-80 prosent sannlíkt, at AaB fer at spæla seg víðari í bólkaumfarið.

Í bólkaumfarinum eru nógvir pengar at vinna. Um AaB um fjúrtan dagar fer at megna at spæla seg víðari í bólkaspælið, fer lutakastið at gera av, um tað – umframt millíónirnar – eisini fer at eydnast at vinna nøkur stig á kontina.

Møguleikarnir hjá norska meistaraliðnum Brann tykjast ikki nakað serligir fyri at spæla seg í bólkaumfarið. Brann hevði mikukvøldið vitjan av franska Marseilles. Fimm minuttir undan hvíldini skoraðu gestirnir einasta málið í Bergan mikukvøldið. Útivallarsigurin ber við sær, at franska liðið er stórfavorittur undan seinna dystinum, sum verður um fjúrtan dagar.

## Nýggj nevnd í NSÍ

**Á eykaaðalfundinum í NSÍ, sum tað er boðað til annað fríggjakvøld, skal nýggj starsvnevnd veljast**

**NEVNDARARBEIÐI**
*Jákup Mørk*

Tað er ikki sørt, at tað er eitt sindur av turbolensi í meistarafelagnum. Fyri einum ári síðani gekk alt upp í eina hægri eind. Meistaraheitið varð vunnið, og á stórfingnu FM samkomuni í ítróttarhøllini var eingin endi á fagnaðinum. Eitt nú vórðu nógvar peningagávur handaðar felagnum, sum fyri fyrstu ferð hevði vunnið FM heitið.

Nú er vanligur gerandisdagur aftur í Runavík. NSÍ hevur framvegis møguleika at vinna heiðursmerkir, men møguleikin at verja FM heitið tykist ikki at vera nakað serligur.

Og nú skal nýggj starsvnevnd veljast. Tað skilst, at formaðurin tey bæði seinastu árini, Dánial Petur Hansen, hevur lagt frá sær sum formaður. Í lýsing á heimasíðu felagsins hevur nevndin lýsing, har tað verður kallað inn til eykaaðalfund fríggjakvøldið 22. august klokkan 19.30.

Dagsskráin er val av nýggjari starsvnevnd og tiltakslimur, og møguligt val av fótbóltsnevnd og tiltakslimum. Fundurin verður í hølum felagsins.